# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð

**Bygdarráðsfundur tann 31. januar 2012, kl. $19^{00}$.**

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Herit Magnussen, Pauli T. Petersen, Evelyn Gaard, Jón Mikkelsen, Bárður Poulsen og Øssur Christiansen.

**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri boðaði Siri S. Niclassen tann 31. januar 2012 frá, at henni berst frá møta á fundinum, og tiltakslimur fær fundarboð í hennara stað.

Tiltakslimurin Øssur Christiansen hevur í telefonsamrøðu við kommunuskrivaran tann 31. januar 2012 fingið fundarboð.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.
Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Øssur Christiansen sum tiltakslimi.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 53**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um liðugtgerð av parti av kirkjugarðinum.

Nevndin mælir til at bjóða jørðarbeiðið út skjótast gjørligt ímillum maskineigarar í Vestmanna, men at kommunan sjálv ger gøturnar og rundanum gravstøðini.

**Viðv. 53**
Pauli T. Petersen setti fram broytingaruppskot, har mælt varð til at beina málið aftur í teknisku nevnd.
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 54**
Tilmæli frá teknisku nevnd um notat frá Karl A. Olsen, borgarstjóra, um grundstykki hjá Heina á Heygum. Umhvørvisstovan kann ikki frábýta økið undir sethúsunum, tí at hetta øki ikki liggur sum sethúsaøki í byggisamtyktini.
J. nr. 2009-406

Nevndin mælir til at broyta byggisamtyktina soleiðis, at økið undir sethúsunum hjá Heina á Heygum verður sethúsaøki.

**Viðv. 54**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð

## Bygdarráðsfundur tann 31. januar 2012, kl. $19^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Herit Magnussen, Pauli T. Petersen, Evelyn Gaard, Jón Mikkelsen, Bárður Poulsen og Øssur Christiansen.
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

**Mál 55**
Tilmæli frá teknisku nevnd um umsókn frá Jógvan í Dávastovu um boriloyvi til jarðhitaskipan á grundstykki teirra matr. nr. 276f, Leitisvegur 5.
J. nr. 2009-427

Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti.

**Viðv. 55**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.15.

Sign.:

Karl A. Olsen Herit Magnussen Pauli T. Petersen

Jón Mikkelsen Evelyn Gaard Bárður Poulsen Øssur Christiansen